B71 bant um í verjuni

Løgmanssteypið: *ÍF, sum í 2. hálvleiki hevði Jens Kristian Eldevig á miðvøllinum, høvdu hesa ferð ikki nógv av bjóða uppá*

Fuglfirðingar vóru bragdligir, tá teir í fyrsta dystinum í bólkaumfarinum vunnu á B36. B71 tapti stórt bæði móti B68 og B36. Sunnudagin vann B71 2–0 á ÍF, sum tóktist vera illa fyri. Tomek, Bárur á Lakjuni, Bárður Mortensen og Eyðun Rygshamar vóru ikki við, tí teir eru skaddir.

Tað var týðuligt, at B71 hesa ferð legði størri dent á verjupartin, enn teir høvdu gjørt í teimum fyrstu steypadystunum. Fyri alt í verðini skuldi dysturin ikki tapast. Hetta saman við at ÍF var rættuliga tannleyst gjørdi, at flogið var lágt og málmøguleikarnir ikki nógvir. Eftir uppspæl í høgru var miðvallarin Kári Sørensen púra leysur, men Allan Joensen vardi fyri. Bernhard Petersen, sum B71 hevur fingið frá HB, var púra blankur eftir horna, men fyri opnum máli sendi hann uppum.

Eitt korter restaðí, tá Bernhard Petersen, sum var vongverji í høgru, setti hol á. Eli Hentze hevði roynt móti málinum, og Allan Joensen hevði í fyrru atløguni hálvbjargað.

Miðvallarin Julian Floresco, sum eftir ein tíma var komin inn á miðvøllin fyri Kristian Nielsen, skoraði til 2–0 beinleiðis upp á frísپark úr 20 metrum. Tað var eitt vakurt mál, frætta vit av Sandi. Tá restaðu níggju minuttir, og tá hevði ÍF verið undirmannað í tíggju minuttir. Mortan Thomsen sá reytt, tá hann fekk annað gula kortið. Eftir at ÍF hevði brúkt allar eykamenninar fekk Ken Bærendsen vøddaskaða í lærið. Tí spældi ÍF bara við níggu monnum síðstu løtuna.

Í 2. hálvleiki kom Jens Kristian Eldevig inn á miðvøllin hjá ÍF. Vit skrivaðu í næstsíðstu viku, at fyrrverandi ÍF spælarin, sum í meiri enn tíggju ár hevur búð í Grønlandi, har hann hevur verið á landsliðnum, var farin at venja við GÍ. Vit skilja á lagnum, at einki spurdist burturúr tí, og hóast Jens Kristian ikki er í nóg góðari venjing, so valdi Petur Mohr í 2. hálvleiki at seta nýggja mannin inn á skaðaplágaða liðið.

B71 vann tryggan sigur á fuglfirðingum um vikuskiftið

B71: Valdemar Nowisci – Bernhard Petersen, Bjørn Thorsteinsson, Jón Brekku, Bergleif Sólsker, Jógvan Jón Petersen – Kári Nielsen, Kristian Nielsen, Kári Sørensen – Rúni í Soylu, Eli Hentze

ÍF: Allan Joensen – Viggo Johannesen, Torstein Joensen, Alvi Justinussen, Mortan Thomsen – Eyðálvur R. Petersen, Rúni Jacobsen, Roy Róin, Ken Bærendsen – Jákup Baldvinsson, Rúni Petersen

JH

Stórur munur á Sevmýri

Løgmanssteypið: *Jón Rói Jacobsen skoraði tvey mál og tykist rættuliga vera komin fyri seg á besta HB liðnum*

HB hevði gott tak á suðuri á Tvøroyri

Tað var sjónligt á Sevmýri, at liðini vóru úr hvør sínari deild. Spælið var einki at reypa av, men eingin ivi var um, at HB hevði nógv tað betra fólkið. Unga TB liðið, sum millum fleiri skaddar spælarar m.a. saknar royndu menninar Jón Tórða Holm og Petur Oluf Joensen, hevði ikki nógv at bjóða uppá. Tó so í 1. hálvleiki tá støðan var 3–0 hildu bæði teir og HB menninir, at Bárður Dimon varð snýttur fyri eitt brotsspark, og um eydnan var við, so kundi Dan Mortensen havt skorað í 1. hálvleiki.

Jón Rói Jacobsen hevur í yngru deildunum víst, at hann hevur – mált við føroyskari alin – fín fótbóltsevnir. Sunnudagin skoraði hann fyrstu ferð tvey mál á besta liðnum, og ivaleyst fer hann ofta at teljast millum málskjúttarnar. Tað fyrra fekk hann, tá eit korter var farið. Eftir innlegg frá Rúna Nolsøe stakk ungi maðurin seg fram millum tveir verjuspælarar.

Tíggju minuttir seinni skoraði Rúni Nolsøe úr sekstan metrum, og tá tað restaðu tveir minuttir av fyrra umfarinum stútaði Símun Eliasen í kassan eftir hornasparksinnlegg úr vinstru.

Eftir steðgin kom Rói Árting á vøllin fyri smáskadda Rúna Nolsøe. Ein annar veteranur, Ingi Rasmussen, fekk – eitt sindur bíligt hildu teir í HB, og tvørámenn vóru ikki ósamdir – brotsparkið, sum Rói Árting økti til 4–0 uppá, og tá Jón Rói Jacobsen staðfesti stórsigurin var púra útselt hjá TB. Jón Rói rann alla verjuna og málverjan av, áðrenn hann trillaði bóltin í netið.

Hjá HB vardi Danny Rasmussen málið. Fyrsti málverjin, Bárður Johannesen, varð í síðstu viku skaddur í hondini undir venjing. Tíggju minuttir vóru farnir av 2. hálvleiki, tá Hans Jørgen Djurhuus loysti Símun Eliasen av, og ein annar ungur maður, Vagnur Mohr Mortensen, kom miðskeiðis í 2. hálvleiki inn fyri Hall Danielsen.

TB: Magni Hentze – Andrass Nolsøe, Magni Petersen, Tórður Mortensen – Teitur Rasmussen, Einar Petersen, Bárður Dimon, André Dalfoss – Dan Mortensen, Hallur Christiansen, Vagnur Nolsøe

HB: Danny Rasmussen – Jóhannes Joensen, Hans á Lag, Florin Miháescu, Janus M. Joensen – Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Ingi Rasmussen, Símun Eliasen – Jón Rói Jacobsen, Pætur Dahl

Úrslit og støður

Kappingin um løgmanssteypið

Bólkur 1
Sumba–KÍ 2–5 (1–3)
1–0: Eirkur Joensen 5.
1–1: Ove Nysted 13.
1–2: Heðin á Lakjuni 43.
1–3: Heðin á Lakjuni 65.
1–4: Jan Joensen 69.
1–5: Marek Vierzbicki 69.
2–5: Spasojé Biberdzic 79.
Reytt kort: Gunnar á Steig, KÍ, 2. og Eirikur Joensen, Sumba, 43.
Dómari: Jens Petur Brattalíð

VB–NSÍ 1–3 (0–1)
0–1: Ian Højgaard 3.
1–1: Eyðun Jacobsen 85.
1–2: Christian Høgni Jacobsen 86.
1–3: Mortan Hansen 90.
Dómari: Niklas á Líðarenda

Bólkur 2
B68–B36 3–2 (3–2)
1–0: Marcello Marcolino 10.
2–0: Fróði Benjaminsen 15.
3–0: Súni Fríði Johannesen 24.
3–1: Jákup á Borg 24.
3–2: John Petersen br 45.
Dómari: Lassin Isaksen

B71–ÍF 2–0 (2–0)
1–0: Bernhard Petersen 75.
2–0: Julian Floresco 81.
Dómari: Birgir Sondum

Bólkur 3
FS Vágar–GÍ 1–1 (0–0)
0–1: Óli Hansen 50.
1–1: John Johansen 67.
Dómari: Oddmar Andreasen

TB–HB 0–5 (0–3)
0–1: Jón Rói Jacobsen 15.
0–2: Rúni Nolsøe 25.
0–3: Símun Eliasen 43.
0–4: Rói Árting br 60.
0–5: Jón Rói Jacobsen 85.
Dómari: Kim Ejdesgaard

Bólkur 1

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt málmunur	stig
1 KÍ	1	1	-	0	-	0	3	1	2	3
2 Sumba	1	1	-	0	-	0	1	0	1	3
3 NSÍ	1	0	-	0	-	1	0	1	-1	0
4 VB	1	0	-	0	-	1	1	3	-2	0

Bólkur 2

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt málmunur	stig
1 B68	2	2	-	0	-	0	9	0	9	6
2 B36	2	1	-	0	-	1	8	3	5	3
3 ÍF	2	1	-	0	-	1	3	6	-3	3
4 B71	2	0	-	0	-	2	0	11	-11	0

Bólkur 3

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt málmunur	stig
1 FSV	2	1	-	1	-	0	5	1	4	4
2 GÍ	1	1	-	0	-	0	10	0	10	3
3 HB	1	0	-	1	-	0	1	1	0	1
4 TB	2	0	-	0	-	2	0	14	-14	0

Viðmerking:

Tórsvøllur ið ikki bleiv

Undirritaði sá eitt áhugavert innslag í Degi og Viku fyrr í farna viku. Hevði ilt við at trúgva mínum egnu oyrum tá eg hoyrdi hvat í formaðurin í mentunarnevndini í Tórshavnar býrað førði framm av argumentum fyri at ongin rennibreyt skal gerast um Tórsvøll.

Tað argumentið, sum hesin annars vættalandi maðurin hevði at føra fram, var: »Eg meini ikki, at tað er pláss fyri eini rennibreyt her á staðnum!«.

Eg meini?? So, so. Ja, sum tað sæst, er grundgevingin fyri at slakta tað einastu ítøkiligu ætlan, sum var í Tórshavnar komunu um at gera rennibreyt, stak væl undirbygd. Serliga tá hugsað verður um, at økið er planera við rennibreyt fyri eyga.

Men nú geri eg hesum manninum fyri órætti, hann førði eisini eitt annað argument fram: »Fótbólturin vil ikki hava rennibreyt!«. Eg gangi út frá, at tað formaðurin meinar er, at tey í varða av fótbóltinum, ikki eru áhugað í at onnur eisini kunna koma fram at í Gundadali. Man hetta verða allur sannleikin? Havi ilt við at fyristilla mær, at tey, ið varða av og eru áhugað í fótbólti, ikki unna hinum ítróttargreinunum umstøður í Gundadali.

Annars kundi ein spurt, um tað at fótbólturin, sambært formanninum í mentunarnevndini, ikki vil hava rennibreyt í Gundadali er nøkur grundgeving? Tað eru nógvir samfelagsbólkar, sum hava áhuga í hesum máli. Fótbólturin er ein sentralur, men allíkavæl bert ein av nógvum bólkum, sum hava áhuga í hesum málið. Hvat siga hinir bólkarnir? Hevur Mentunarnevndin vent sær til hesar bólkarnar?

Ljótasta bygningsverk í landinum

Men hví vil fótbólturin ikki hava rennibreyt? Sambært formanninum: »Eitt sum hevur verið ført fram er, at

áskoðararnir koma at sita langt burtur!«?? Veit formaðurin, hvussu langt burtur man kemur frá síðuni av vøllinum, um rennibreytin verður gjørd?

Kanningar hava víst, at um man ger ein vøll eins og tann á Toftum, so er einans tørvur á at taka 4 tær fremstu røðirnar burtur niðan ímóti høllini á Nabb og gera ein vegg niðurvið eins og hinumegin.

Her kann so byggjast út, tá dystir eru, sum krevja nógv áskoðarapláss. Vøllurin skal so flytast 2 metrar móti høllini á Nabb, so úrslitið er, at áskoðarnir hesumegin koma 2 metrar nærri vøllinum, meðan áskoðararnir oman móti niðara vølli koma at sita 2 metrar longur vekk. Og harafturat verða áskoðaraplássini við endan flutt út til síðurnar, og eru tað hesi áskoðaraplássini, sum gera Tórsvøll til ljótasta bygningsverk í landinum.

Eitt annað, sum formaðurin í mentunarnevndini førdi fram var, at býráðið vil »gera alt sum vit kunna, fyri at man kann fáa eitt ordiligt anlegg at renna á eisini!« Hetta er so nú víst í gerð við, at býráðið farna hósdag avlívaði tað einastu ætlanina, sum var um at gera rennibreyt i kommuniuni!! Stóra takk fyri!

Við frælsari ítróttarkvøðu
Heri Ziska

Ljós yvir landið

Bara 21 ára gamalur, í 1904, yrkir Hans Andrias henda eggjandi sangin, ið byrjar við orðunum: »Ljós yvir landið og í barmi manna/ lívsfríska megi,/so ein hvør kann sanna«. Sangurin hevur verið brúktur alla hesa øldina til at eggja fólki við, men best kend er tann beiska uppgevandi reglan, tá ið hon stendur einsamøll: »Saman at halda var ei okkum givið«.

Hóast partapolitikkurin ikki var ítøkiligur veruleiki fyrr enn tvey ár seinri, (tað stóra syndafallið, sum onkur hevur kallað árið 1906) so var tvíningur longu komin í tjóðskaparspurninginum.

Hans Andrias var í sjálvstýrispartinum og roynir at eggja hin partin, sínar landsmenn, til at standa saman um tjóðskaparmál t.d. málið.

Striltið hevur gingið. Mangur hevur lagt nógv fyri og onkur fingið deyðamein, tøkini vóru ov tung, men kvinkað er hin rætta vegin. Torir og dugir nakar at ímynda sær, hvussu støðan hevði verið, um hetta stríð ikki var strítt.

Reglan hevur eisini verið brúkt sum prógv fyri, hvussu vánaligir føroyingar vóru, og at tílíkt fólk kundu ikki stýra sær sjálvum.

Tað vóru jú føroyingar sjálvir, sum ikki vildu hava føroyskt innum skúla- og kirkjugátt. Í øllum tjóðum og einstaklingum er ein teskandi ella rópandi rødd, sum sigur: Best man vera sum er. Vit vilja ongar broytingar hava.

Men tað var ein triði partur, eitt annað land, sum hevði tað politiska valdið. Har sat ein máttmikil amtmaður, sum við sínum embætismonnum, sýslumenn, prósturin (við sínum prestum) og allir kongsbøndirnir. Hóast hesir menn vóru føroyingar, skuldu teir fyrst og fremst vera danskir embætismenn, ikki minst um teir sótu í Tinginum. Tað kundu koma teimum dýrt at standa, um teir ikki ágrýtnir virkaðu fyri tí danska politikkinum, sum lá í kortinum. Soleiðis at vera í tí rætta partinum, honum sum valdið átti, kundi um illa vildi til, altíð loysa seg. Hetta fingu sjálv embætismenn á lágum støði t.d. lærarar at sanna.

Eisini hin vanligi maðurin kundi merkja sviðan av ikki at vera í tí rætta partinum.

Um degini sá eg ein javnaðarmann brúka regluna: »Saman at halda var ei okkum givið«. Tað hevur hann sín sjálvsagda rætt til, men eg støðgaði á, tá eg las regl-

una brúkta soleiðis og kom at hugsa um Hans Andrias, sum hevði stóran samhug við tí minni menta, men bleiv ikki limur í tí javnaðarflokkinum í Føroyum,ið var stovnaður við danskari hjálp og eftir donskum ynski.

Tað hevur verið lætt at verið javnaðarpolitikkari í Føroyum og veljari síðani 1948.

Umráðandi var bara at halda seg so tætt at tí danska javnaðarflokkinum sum til bar.

Hann hevði tað stóra orðið at siga í Danmark, treytirnar, sum javnaðarflokkurin í Føroyum, skuldi lúka, vóru bara ikki at ynskja nakað, sum gekk ímoti vilja danska javnaðarflokksins. Soleiðis vóru treytirnar og eru tað enn.

Men alt broytist, eisini tann danski javnaðarflokkurin, sum, hóast tú í politikki aldrin skal siga aldrin, í hvussu so er ikki í núverandi hami, kemur at hava tað stóra orðið at siga í donskum politikki.

Hin føroyski javnaðarflokkurin kann koma og sita eftir við svartaperi.

So góðu javnaðarfólk komi og syngi sangin hjá Hans Andriasi av fullum huga, tá skulu tit síggja.

»Ljós yvir landið samanhald kann gera,
tað gevur megi byrðarnar at bera;
Birtið tí brandin fjálga upp at loga.
Væl man hann duga!«

Romantikkur sigur onkur, men eisini hann er partur av lívinum og kann sum alt annað báði vera lívgandi og mergsúgvandi. Sanniliga skulu vit arbeiða, men lívið er meir enn matur.

Steinbjørn B. Jacobsen

Kjakið fer fram í Sosialinum

Pensionistar enn einaferð snýttir

Tað tykist, sum um tað er vorðin ein sportur hjá samgonguni at lúgva fyri teimum, ið bert hava avlamis- og fólkapensión at liva av.

Tey flestu minnast, og nógv hava kent sviðan av, hvussu óskilið við pensiónunum hevur verið síðan á jólum. Neyðugt er ikki at endurtaka tað, sum er sagt um óskilið, síðan lógin um almannapensiónir fór at virka á nýggjárinum.

Vit í minnilutanum í løgtinginum hava staðliga ávara samgonguna ímóti at pressa lógir ígjøgnum, uttan at neyðugu fyrireikingarnar eru gjørdar til fulnar. Tá lógin um ásting av almannaveitingum var til viðgerðar beint áðrenn jól (ár ov seint), fregnaðust vit m.a. eftir konsekvensútroknningum fyri, hvussu nýggja lógin kom at ávirka fíggjarviðurskiftini hjá teimum , ið hava rætt til pensiónir,.av ymsum slag. Samgongan vildi ikki lurta eftir minnilutanum, og ein av fylgjunum var, at flestu pensionistar fingu meira í skatti enn áður, uttan at samgongan hevði gjørt sær far um henda veruleika.

Tá hetta gjørdist samgonguni greitt, lovaði hon í panikki pensionistunum skattalætta og legði uppskot fyri løgtingið um hækking av botnfrádráttinum hjá pensionistum.

Uppskotið var skundað ígjøgnum nevndarviðgerð og víkt bleiv frá tíðarfreistini fyri viðgerð av løgtingsmálum, fyri at pensionistar kundu fáa lættan saman við pensiónunum mánaðarskiftið mars/apríl.

Tá pensiónin so kom, máttu bæði pensionistar og løgtingsmenn ásanna, at enn einaferð var ein lóg skundað ígjøgnum, og at enn einaferð, í hesum førinum, gørdist tann lovaði skattalættin ikki veruleiki.

Ger ongantíð tað hann lovar

Nú má tíðin vera komin at spyrja, hvussu leingi kann ein landsstýrismaður halda áfram at fara lætt um sannleikan yvir fyri pensionistum og løgtinginum. Tað tykist løgið at landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum bleiv offraður, ti hansara egni flokkur ikki hevði álit á honum, tá m.a. sami flokkur staðiliga góðtekur, at landsstýrismaðurin í almannamálum ongantíð ger tað, hann lovar, heldur ikki hesaferð.

Tað einasta landsstýrismaðurin í almannamálum skuldi gera, fyri at pensionistar kundu fáa lovaða skattalættan, var, at hann syrgdi fyri, at hvørt pensiónsslag sær fekk frámerki, soleiðis at skattaskipanin kundi finna út av, hvønn frádrátt tey ymsu pensiónssløgini skuldu hava, men hetta hevði ikki hansara prioritet.

Tá man so hoyrir at landsstýrismaðurin í almannamálum, í staðin fyri at gera tað, hann er settur til, undirheldur nøkrum fáum fólkatingslimum, ið eru møttir av berari høfligheit, við at vit í Føroyum framyvir skulu hava sama samband við Danmark sum Mikronesia og Palau hava við USA, ja so má verða komið hartil hjá fólki at spyrja seg sjálvi, um ráðiligt er at loysa við slíkum politikarum.

Kristian Magnussen
løgtingsmaður

Sannleikans tími

Tað var gleðiligt at fylgja orðaskiftinum í fólkatinginum hósdagin tann 6. apríl á 2000.

Tað er einki nýtt í tí, at danir fegin vilja halda fram við at ráða yvir Føroyum. Tað áhugaverda var, at teir nú spældu greitt út og søgdu, at teir ikki longur vildu gjalda ein yvirprís fyri at sleppa at vera imperialistar. Vilja vit vit vera saman við teimum, so rýkur blokkurin. Vilja vit gerast eitt fullvalda ríki, so hendir tað sama.

Fyri fyrstu ferð er tað tí greitt, at tær fíggjarligu avleiðingarnar vera tær somu fyri okkum uttan mun til um vit halda fram við tí skipan vit hava, ella um vit velja javnaðaruppskotið, sambandsuppskotið, ella um okkum dámar betur uppskot landsstýrisins til eina skipan av viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark.

Hetta eru stórtíðindi, og serliga fyri okkum, sum vilja at vit skulu ráða yvir hesum landi frá hægstu tindum út á ytstu mið, var hesin dagurin søguligur, tí nú er alt tos um pengar tikið av skránni. Nú skulu vit bert svara, um vit eru føroyingar ella ikki. Úrslitið er tí givið frammanundan.

Zakarias Wang
7/4 2000